# Fýra húsanummur í Múla

**Hvannasunds kommuna hevur nú fingið veganøvn og húsanummur. Av hesi orsøk er eisini staðfest, at í Múla eru fýra hús, sum í dag hava hvør sítt húsanummar**

BYGDIR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Múli:** Ikki óvæntað verður tann átta kilometrar langi vegurin úr Norðdepli og norður til Múla kallaður Múlavegur.

Líka so vist er tað, at vegurin frá tunnilsmunnanum, tvørtur um brúnna um Hvannasund og inn móti bygdini Hvannasund eitur Hvannasundsvegur.

Umframt hesi nøvnini eru fleiri onnur nøvn í teimum fimm bygdunum í kommununi, nevniliga Hvannasund, Norðtoftir, Depil, Norðdepil og Múli.

Frammanundan góðkenningini av nøvnunum hevur málið verið til viðgerð í kommununi.

Mikudagin í farnu viku komu so boðini um, at tey vórðu góðkend og løgd út á heimasíðuna hjá Matrikulstovuni.

### Oyðsla við numrum

Tað hevur gingið væl at fáa tær ymisku kommunurnar kring landið at fáa bæði gøtunøvn og nummur til tey einstøku húsini.

Frá myndugleikanna síðu og frá Matrikulstovuni hevur verið gjørt eitt miðvíst arbeiði at fáa hetta málið loyst kring alt landið.

Høvuðsendamálið við at hava allar hesar adressurnar er, at tað skal vera bæði lætt og skjótt at finna vegin fram um hetta gjørdist bráðneyðugt.

Her kann t.d. verða talan um sjúkrabil, brandbil og løgreglu, men eisini hjá lækna, hýruvognum og vanligum fólki.

– Høvuðsendamálið hevur sostatt ikki verið at varðveita gomul staðanøvn. Hetta kemur í aðru røð, sigur Matrikulstovan.

Lagt verður tí aftrat, at ein eigur at vera sparin við veganøvnum, men at ein eigur heldur at vera meiri oyðslutur, tá talan er um húsanumrini.



*Fýra húsanummur eru á Múlavegnum í Múla - 1, 3 og 5 í høgru síðu, og nr. 2 í vinstru síðu*

## Skótar hittast til gudstænastur

22. februar er dagurin, tá skótar í Føroyum og aðrastaðni kring allan heimin hittast til gudstænastur.

Hesin serstaki dagurin hjá skótunum verður eisini nevndur Hugsunardagurin.

Á enskum máli verður hann nevndur Thinking Day ella World Friendship Day. Og tað kemur ikki av ongum.

– Henda dagin hugsa vit um skótavinir okkara kring allan heimin, sigur Føroya Skótaráð.

Hesin felagsskapurin umboðar skótarnar hjá Frelsunarherinum, skótarnar hjá KFUM, skótarnar hjá KFUM og Føroya Skótasamband.

Ein slíkan dag hava skótarnir eisini møguleika at senda øðrum skótum – og øðrum ikki-skótum – eitt Hugsunardagskort við eini skótaheilsan.

Í Føroyum verða harafturat skipaðar gudstænastur í kvøld kl. 19 í fimm kirkjum - í Havnar kirkju, Christianskirkjuni, Leirvíkar kirkju, Kollfjarðar kirkju og í Skálavíkar kirkju.

Hesar serstøku skótagudstænasturnar verða hildnar til minnis um stovnararnar av skótarørsluni, hjúnini Baden-Powell ið bæði høvdu føðingardag henda dagin.

sb.

# Nógvir møguleikar eru í Íslandi

**Vikuskiftið 9. til 12. mars skipar Hotel Ørkin í Reykjavík fyri fjølbroyttari ráðstevnu um vinnu og samstarv. Endamálið er at vísa á teir møguleikarnar, sum Íslandssáttmálin gevur føroyingum**

SAMVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nógvir møguleikar eru fyri føroyingar Íslandi. Finna vit teir?!*

**Reykjavík:** – Ber yvirhøvur til hjá føroyingum at fara undir vinnuligt virksemi í Íslandi?

Hetta er ein av mongum spurningum, sum uttan iva verður settur fleiri ferðir á ráðstevnuni á føroyska sjómansheiminum í Reykjavík.

Fólkini á Ørkini hava nevniliga sett sær fyri at vísa m.a. føroyingum á teir møguleikarnar, sum finnast í Íslandi.

Hetta verður gjørt við fyrilestrum og framsýningum og við vitjanum á hesi ráðstevnuni, sum júst ber heitið »Møguleikar í Íslandi«.

Ætlanin er nevniliga at vitja fyritøkur sum føroyingar eiga og reka í Reykjavík. Og í hesum sambandi slepst neyvan undan eini vitjan í onkrari av fyritøkunum, sum havnarmaðurin Jákupi á Dul eigur í Íslandi.

Stevnan byrjar fríggjakvøldið 9. mars og endar mánadagin 12. mars, tá farið verður heimaftur við Atlantsflogi.

### Royndir og møguleikar

Lagt er upp til eina sera forvitnisliga skrá hesar dagarnar, við einum rættiliga stórum úrvali av evnum at lýsa og vísa á møguleikarnar, sum hóast alt eru hjá føroyingum í Íslandi.

Millum tey mongu áhugaverdu evnini fer stórur dentur at verða lagdur á at vísa á tær royndirnar, sum føroyingar longu hava gjørt sær her á tí vinnuliga økinum.

Ein av fyrilestrararhaldarunum er vinnulívsmaðurin, Olaf Olsen, sum fer at vísa á gongdar leiðir innan íslendska fiskivinnu, eins og ein amerikanskur løgfrøðingur fer at siga frá sínum royndum í Íslandi.

Tað sama fara ein íslendskur byggifrøðingur, ein handverkari og ein tryggingarmaður at gera, áðrenn fleiri føroyingar, sum starvast í Íslandi fara at geva góð ráð um, hvussu ein ber seg at í hesum landinum.

Oljan verður heldur ikki gloymd við eitt slíkt høvi. Ein íslendskur ráðgevi fer nevniliga at vísa á møguleikarnar innan olju- og gassvinnu.

Ferðavinnan er ein sjálvsagdur partur av eini slíkari ráðstevnu, og fara umboð fyri Atlantsflog og Faroe Travel at greiða frá ferðamøguleikum millum londini og til londini bæði.

Leygarkvøldið verður skipað fyri føroyskari gospelkonsert og sunnudagin verður føroyskt møti á Ørkini, har kendir føroyingar syngja og tala.

Á ráðstevnuni verður eisini ein listaframsýning, sum føroyski listamaðurin Oggi Lamhauge og onnur skipa fyri.